## DAGSINS MEINING

# Eigur at sleppa at royna seg

– Hvat heldur tú um nýggja landsstýrið! Hetta er spurningurin tú hoyrir nærum alla staðni, har tú hittir fólk: á kaffistovum, í undirhúsunum, í egningarskúrunum, í hitarúmunum í svimjihøllunum, á arbeiðsplássum og aðrastaðni við. Og svarini eru ymisk. –Fólkaflokkurin hevur svikið fullveldið - Javnaðarflokkurin hevur havt útsølu – Sambandið hevur sett skeivu fólkini í Nesið - Tjóðveldisflokkurin og hinir gomlu samgonguflokkarnir vunnu valið og tað er ódemokratiskt, at teir ikki kunnu halda fram osfr. Men hvussu og ikki – so hava tríggir stórir flokkar, hvat er eindømi, funnið saman og skipað nýtt landsstýri. Hetta ásanna øll, og mong siga eisini, at tað nú er rímuligt og rætt, at hesir sleppa at royna seg. Men sleppa teir veruliga at royna seg! Tí skulu teir ikki bara til at taka upp eftir aðrar!

Flokkarnir hava skrivað samgonguskjal, ið setir framtíðar politikkin út í kortið. Men tað er ein sannroynd, at eitt nýtt landsstýri byggir fyrst og fremst á herarnar á teimum, ið sótu frammanundan. Komandi tilgongdin verður tí nógv tengd at tí úrsliti, ið undanfarna landsstýrið lat eftir seg. Og tað er so ikki nøkur vøkur mynd. Eitt samfelag, hvørs vinnur eru í kreppu ella um at koma út í eina álvarsliga kreppu, samtíðis sum ein triðingur av blokkinum úr Danmark er strikaður, er búgvið, sum henda samgongan fær upp í hendurnar. Ein landskassa, sum fólk flest enn ikki kenna innihaldið í. Tað, ið higartil er komið fram um fíggjarligu støðuna er møguliga bara toppurin á ísfjallinum.

Líta vit aftur um bak kunnu vit bara ásanna, at vandi er í hvørjari vælferð. Neyvan nakrantíð í Føroya søgu hevur vælferðin verið størri enn seinastu árini. Ongantíð hevur viðrákið verið so stórt – nærum alt hevur lagað seg – so gott sum uttan at undanfarnu samgongurnar hava havt fyri neyðini so frægt sum at lyfta hond frá síðu. Men hví hava vit so ikki dugað at húsast við hesum rímidømi? Eftir sjey góð ár koma sjey rak ár. Soleiðis hevur tað eisini verið her á landi. Men undanfarnu samgongur bóru seg at sum at tey góðu árini fóru ongantíð at steðga. Hóast tað varð ávarað ímóti at skera ov nógv av blokkinum við einum høggi, so varð ikki lurtað. Ein av vanlukkunum við síðstu samgongunum var, at tú hevði ein fíggjarmálaráðharra, sum ongantíð vildi lurta eftir øðrum, ikki ein gang sínum egnu samgongufeløgum. Tá hann var ávaraður um vandan við at fremja ein so stóran blokkniðurskurð vóru víðagitnu orð hansasra, at ráddi hann var allur blokkurin skorin burtur í einum og tað í morgin.

Landsstýrið fær neyvan gjørt annað í løtuni enn at sigla sum frægast millum skerini og tryggja sær, at teir ringastu brotasjógvarnir ikki raka so meint. Ringt er at ímynda sær eina arbeiðsføra andstøðu, nú hon í veruleikanum hevur brúk fyri sjálvsanmnrakan meira enn nakað annað. Men kanska henda sjálvsannsakan fer at gera, at vit fara at fáa eina samgongu og eina andstøðu, sum í felag og við konsesus fara at demma upp ímóti brotasjógvunum, sum uttan iva fara at verða harðari og harðari sum tíðin gongur. Tí er greitt: svára støðan, sum undanfarnu samgongur hava borðreitt fyri ABC-samgonguni, krevur, at allar kreftir frá A til H gera alt fyri at finna tær bestu loysnirnar. Sum støðan sær út er ikki pláss til ósemjur og stríð.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking

**Hans Jacob Joensen**
*biskupur*



Í viðtali við Dimmalætting hósdagin 12. februar 2004 sigur Sigmundur Poulsen, advokatur: *»Hetta er møsn. Tað er eingin løgfrøðisligur grundvøllur í úttalilsunum hjá bispi.«*

Eg veit væl, at fyrivarni skal takast, tá tað snýr seg um viðtalur av slíkum slagi. Tí fari eg ikki at gera nakrar beinleiðis viðmerkingar til tað, ið her verður endurgivið, men eg fari at loyva mær í stuttum at siga mína fatan av hesum viðurskiftum.

Vit kunnu staðfesta, at sama grundlóg, sum tryggjar øllum borgarum í ríkinum trúarfrælsi, beinleiðis tekur sama trúarfrælsi frá kongi. Rættin at velja millum trúarsamfeløgini ella at standa uttanfyri, sum grundlógin tryggjar øllum øðrum, júst henda rætt tekur hon frá kongi - sum hinum einasta. Hann skal hoyra til fólkakirkjuna, sum er tann evangelisk lutherska kirkjan í landinum. Men hetta er eitt so álvarsamt inntriv í tað persónliga frælsið, sum grundlógin annars tryggjar øllum øðrum, at tað mega vera heilt serligar orsøkir til, at tað verður gjørt. Eftir míni hugsan nýtist okkum ikki at gita um, hvørjar orsøkirnar eru, tí grundlógin sigur tað. Orsøkin er, at Danmark skal hava eina **fólkakirkju**, og ikki ein »stovn« fyri átrúnað, og henda fólkakirkja skal vera hin evangelisk-lutherska kirkjan. Men sum øll onnur trúarsamfeløg hevur evangelisk-lutherska kirkjan limir, sum allir uttan undantak skulu lúka ávísar treytir. Ófrávíkiliga fortreytin fyri at kunna útinna myndugleika í fólkakirkjuni er, at tú ert limur í hesi kirkju. Tí má staturin eisini lúka hesar treytir, skal nøkur fólkakirkja vera. Men staturin sum »verk« kann ikki vera limur í einum trúarsamfelagi, í hesum føri evangelisk-luthersku kirkjuni, tað kunnu bara einstakir persónar vera. Statsins »umboð« fram um øll onnur er kongur, men skal hann útinna myndugleika í evangelisk-luthersku kirkjuni, má hann sum øll onnur vera limur í hesi kirkju. Hetta er orsøkin til at sama grundlóg, sum tryggjar øllum borgarum í ríkinum trúarfrælsi, tekur trúarfrælsið frá kongi. Valið stóð millum at hava eina fólkakirkju ella ein ella annan »stovn« fyri átrúnað, har evangelisk-lutherska kirkjan hevði verið ein fríkirkja sum aðrar fríkirkjur.

Men júst við at gera hetta ekstraordinæra inntrivið í rættindi kongs - at krevja, at kongur skal vera limur í evangelisk-luthersku kirkjuni - viðurkennir og knæsetir grundlógin meginregluna, at treytin fyri at útinna myndugleika í fólkakirkjuni er limaskapur í evangelisk-luthersku kirkjuni. Hetta er jú galdandi øll trúarsamfeløg, øll fakfeløg og allar felagsskapir við, at limaskapur er treytin fyri at útinna myndugleika. Men limaskapur er altíð persónligur, hann kann hvørki útdelegerast ella arvast. Tá ið tað tí verður kravt av ovasta manni í ríkinum, at hann skal vera limur í evangelisk-luthersku kirkjuni, verður sjálvsagt sama krav sett øllum øðrum, sum skulu útinna myndugleika í hesi kirkju. Einasti munur er, at kongur hevur einki val, meðan øll hini kunnu velja. Men tey fáa sjálvsagt ikki bæði, ikki bæði at kunna útinna myndugleika í evangelisk-luthersku kirkjuni og samstundis at sleppa at hoyra til eina aðra kirkju.

Tað er óneyðugt at leggja afturat, at einki parlament kann løggeva ímóti grundlógini, og ongar lógir eru galdandi, sum eru í stríð við grundlógina.

Hetta var tann »løgfrøðiligi grundvøllur« orð míni til blaðfólkið á Dimmalætting bygdu á, men eg fari at lata onnur meta um dugin í honum. Men eg hvørki vil ella kann frásiga mær rættin at lesa og royna at skilja grundlógina. Tað er rætt og slætt skylda mín, so satt sum tað í setanarbrævi mínum beinleiðis er mær álagt at halda grundlógina.

# Takk fyri Tobbi

**Finn Hansen**

Eg hevði satt at siga ikki roknað við, at tað fór at verða ein fullveldismaður, sum fór at gera enda á fullveldis samgonguni. Hevði Tobbi vitað, at hann kappaði høvdið av sínum egnu, so hevði hann neyvan skrivað lesarabrævið, sum gjørdi enda á samgonguni. Annars so skalt tú hava takk fyri Tobbi, og vónandi ganga tað nógv ár, áðrenn Tjóveldisflokkurin kemur í samgongu aftur. Haldi sjálvur, at hann hevur gjørt nóg stóran skaða sum er.

# Afturhvarv í Bygdarhúsinum í Leirvík

Leygarkvøldið 21. februar skipar Svimjifelagið Reki fyri einum stórum afturlítandi dansitiltaki í Bygdarhúsinum í Leirvík, har átta ymiskir bólkar og solistar luttaka.

Byrjað verður kl 23 við teimum báðum fløguaktuellu Høgna Lisberg og Søren Søgaard.

Síðan spæla leirvíksbólkarnir Kallar, Satisfaction og Que Vadis frá 60'- og 70'-unum, meðan Varðar umboða '80-ini. Velvet er yngsti bólkur, hann spældi í 90'-unum.

Eisini luttekur Essa Jacobsen.

Fólk kunnu teknað seg til tiltakið við telduposti til reki@post.olivant.fo

Eisini ber til at ringja ella senda SMS til 57 51 32 ella 25 23 49


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


## VIÐMERKINGAR

# Sambandsflokksins ABC

**Niels Kári Nielsen**



Tjóðveldisflokkurin hevði ein stóra lýsing í bløðunum, sum hann kallaði: »**Sambandsflokksins ABC**«. Lýsingin skal helst skiljast soleiðis, at avrik og ætlanir hjá Tjóðveldisflokkinum standa høgrumegin, ætlaninar hjá nýggju samgonguni standa vinstrumegin.

Føroyskt Fullveldi - »Ríkiseindin« skal ikki skalast!

Kvinnur í Landsins Leiðslu - Bara menn sleppa at stýra!

Føst Búskaparstýring - Útgjaring til komandi ættarlið at rinda!

Yvirskot á Fíggjarlógini - Stórt undirskot á Fíggjarlógini!

Frælst vinnulív - Politiskt stýrd vinna!

Samhalds Sosialar Skipanir - Skattalættar til tey Ríkastu!

Eg halda, at hendan samanbering hevur brúk fyri einari rætting, sum tekur støði í veruleikanum, og ikki í heilaspuna og stórlætisørskapi, sum Tjóðveldisflokkurin so við og við er kendur fyri.

Føroyskt Fullveldið - Hevði verið = 1500 milliónir í undirskoti 2004!

Kvinnur í Landsins Leiðslu - Avgjørt eitt mál at arbeiða við!

Føst Búskaparstýring - Heimsmet í øking í almennum útreiðslum,

- til komandi ættarlig at rinda!

Yvirskot á Fíggjarlógini - Vit bíða spent eftur tykkara uppskoti!

Frælst vinnulív - Hvat fyri vinna?

Samhalds Sosialar Skipanir - Lat okkum nú síggja.

Nú er kanska onkur sum ikki skilir hetta - her eru nakrar útgreiningar.

**1500 milliónir í undirskoti 2004!**

Tá harðast leikaði á í fullveldisrokinum í 2000-2001, søgdu nógvir Tjóðveldismenn

»Lat okkum taka 4 ára skiftistíð, tað gongur jú strúkandi«

Um so varð, vildi tað í 2004 restað í 600 milliónir í blokki.

Øll mál vórðu yvirtikin, sendistovur, stuðul til lesandi, o.s.fr.

Hetta hevði kostað minst 400 milliónir.

Og so eitt undirskot upp á 500 milliónir á fíggjarlógini í ár.

Altso í alt 1500 milliónir krónur, sum skattaborgarin hevði skula goldið!

**Heimsmet í øking í almennum útreiðslum, til komandi ættarlig at rinda!**

Tað er eingin ivi í, at økingin í almenna sektorinum man vera heimsmet í demokratiska heiminum, og aftan á 6 ár í allar allar bestu tíðum, eigur landskassin bert 257 milliónir í tøkum peningi.

**Vit bíða spent eftur tykkara uppskoti!**

Tjóðveldisflokkurin segdi eftir valið, at hann fór at leggja sítt egna fíggjarlógaruppskot fyri 2004 fram, og at hetta skuldi vísa eitt yvirskot - Føroya fólk bíðar í spenningi eftir tí!

**Hvat fyri vinna?**

Hvat er gjørt fyri vinnulívið? Karmar, karmar, karmar og vanttætt skott millum tað almenna og vinnuna, tað hava verið lyklaorðini hjá fullveldissamgonguni.

Hvar er úrslitið?

Í 1998 varð nógv tosað um, at búskapurin skuldi hava fleiri bein at standa á.

Nú 6 ár seinni átti man í øllum førum sæð spírar til hesi beinini, sum skuldi fíggjað fullveldið Føroyar, og sum skuldi skapa ein stabilan búskap.

Men hvar eru hesi beinini?? Hagtøl vísa, at útflutningurin hjá Føroyum í 2003 var meir enn 99% fiskur, tað sama sum í 1998. Tað vil siga eingin øking av øðrum vinnum, og tað sær út til at vera ringt at fáa eyga á nakað, sum er gjørt fyri at broyta hetta.

Í Íslandi vænta teir, at gransking fer at skapa stóra virðisøking í fiskivinnuni.

Hvar er gransking í Føroyum? Verður tað eitt slagorð á sama hátt sum »foredling av fiskavørum« sum var tikið av hillini og støvað av til hvørt val í eitt mannaminni, fyri síðani at blíva gloymt aftur til næsta val.

# Verkætlan um vatn til landsbygdina Xetonox í Guatimala

TÍÐINDASKRIV
*frá Frelsunarherinum*

Heimaforbundið er kvinnufelagsskapur Frelsunarhersins, og er hesin felagsskapur ein av heimsins størstu. Frelsunarherurin arbeiðir í 108 londum og hesa vikuna stílar felagsskapurin fyri missiónssamkomu, har innsavning er til verkætlan um vatn til landsbygdina Xetonox í Guatimala.

Veruleikin er at hvørt menniskja dagliga tørvar 25-40 litrar av vatni. Í Noregi til dømis er ein sonn ovurnýtsla av vatni. Hvør borgari brúkar um 200 litrar um døgnið. Reint vatn er ein sjálvfylgja fyri okkum, samstundis sum veruleikin er at 1/6 av heimsins íbúgvum ikki hava møguleika til reinan vatnsdropa.

Í landsbygdini Xeton ox ganga tey 4 km eftir vatni. Sannleikin er, at tað eru børn og kvinnur, ið dagliga bera vatn. Tað er tí lætt at skilja, at tað verður sonn broyting, ið hendir, tá vatnleiðing verður løgd frá kelduni og inn í landsbygdina. Vit ynskj at innsavningin skal lætta um byrðuna hjá hvørjum íbúgva. Verkætlanin er góð langtíðar peningaíløga.

Frelsunarherurin í Guatimala hevur lýst verkætlanina út í æsir ´æi samarbeiði við mynd ugleikum bygdarinnar. Framtíðarætlanin er, at vatnleiðingin skal víðkast til tvær grannabygdir. Vit eru sannførd um, at verkætlanin verður til gleði fyri mong, so at framtíð teirra verður ljósari.

Í Frelsunarherinum í Havn verður almenn samkoma hóskvøldið 19. februar kl. 20.00. Sangkórið Sólarmagn av Velbastað syngur og major Njál Djurhuus greiðir frá verkætlanini og arbeiði Frelsunarhersins. Bæði menn og kvinnur eru vælkomin.

### Karaktermorð í nýggjari tið 3:

# Anfinn Kallsberg samanborið við Dreyfus og Tønnes tilburðirnir

**Jón Ellendersen**



Dreyfus kapteynur verður handtikin fyri hásvikagerð orsakað av einum ikki *dagfestum og ikki undirskrivaðum skjali*, sum fekk heitið *"Bordereauið"*, meðan Anfinn varð ákærdur fyri alt frá ógegni til kriminalitet, og eisini her lá ein bók sum grundarlag, nevniliga "Skjót Journalistin".

Dreyfus varð av franska krígsrættinum dømdur til tignarlækkan og burtursøgn, Anfinn varð av stórum parti av Føroya løgtingi dømdur til tignarlækkan og burtursøgn úr landsstýrinum, ein størri eyðmýking enn nakar annar føroyskur politikari hevur verið fyri.

Eitt parísblað skrivar, at Dreyfus als ikki er dømdur við Bordereaunum sum grundarlag, men hinvegin orsakað av treimum loyniligum skjølum "Dossierið", sum eingin annar hevði sæð uttan krígsrætturin. Í Anfinnsá tilburði var bókin, Skjót Journalistin helst bert ein umbering fyri at skumpa Anfinn av trónuni so Høgni og Tjóðveldið, sum eg vísti á 2. parti, kundu sleppa framat. Ætlanin var jú, at Anfinn fór frá og Fólkaflokkurin umskipaði seg, og so var nærum sjálvsagt, at varaløgmaður fekk løgmansembætið.

Nýggj prógv verða løgd fram um, at Esterhazy er tann seki, og hesuferð er tað svágur Dreyfus, sum leggur prógvini fram. Á sama hátt verða "prógv aftaná prógv" løgd fram, serliga av tjóðvelinum um, at Anfinn lýgur, er krimineller o.sfr.

Esterhazy verður tó fríkendur 11. januar 1898 á ein ógvuliga forargiligan hátt. Dagin eftir útgevir Emil Zola kenda ákæruritið "J'accuse" (Eg ákæri). Zola verður dømdur at sita í 1 ár, men flýggjar til London. Piqart verður koyrdur úr herinum. Teir, sum á ein so skammiligan hátt løgdu eftir Anfinni, vórðu allir fríkendir, tí "teir tæntu reinleikanum í føroyskum politikki".

Eg kenni eins og Zola, at tað er neyðugt at koma við eini ákæru móti teimum, sum hava framt hetta Føroya stórsta karaktermorð, tí tað kann ikki vera rætt, at føroyskur politikkur, sum frammanundan var merktur av klandri og stríði, omaná skal merkjast av "amerikanske tilstande", har alt, og eg meni ALT kann brúkast til tess at fella ein politiskan mótstøðumann.

Ein samdur krígsrættur avger nú, at Dreyfus skal fyri rættin í Rennes. Samstundis sigur Esterhazy úr London, at tað var hann, sum skrivaði Bodereauið.

Rættarsakin er ein stórur sjónleikur. Sakførarin hjá Dreyfus slær fast, at *har var ikki eitt einasta prógv um, at Dreyfus var sekur.*

Tann almenna og politiska rættarsakin móti Anfinni var á sama hátt ein sjónleikur, og hóast bókin Skjót Journalistin kemur við hópin av "prógvum", so eru hesi prógv framman undan kend og avgreidd í seinast í 80unum og viðurskiftini rættað. Einki nýtt sum kann rættvísgera, at Anfinn varð viðfarin sum hann var, er at finna í bókini, einki. Men við, eins og propagandaministarin hjá Hitler, at endurtaka lygnina nóg ofta, var stórur partur av fólkinum samd um, at *Anfinn var sekur.* Jú, demagogi, endurtikin nóg ofta, er betri vápn enn sannleikin, tað hava vit eisini sæð í undanfarna valstríði.

Stjórnin bjóðar síðani Dreyfus at verða náðaður og Dreyfus tók av til tess at fáa møguleikar at prógva, at hann var ósekur. Dreyfus fær amnesti. Dreyfus verður fullkomiliga fríkendur og gerst majorur í herinum við Piqart sum generalmajori.

Tað tók ellivu ár áðrenn rættvísin sigraði í Dreyfus tilburðinum.Dreyfus fekk tó ikki loyvi at luttaka í 1. heimsbardaga.

Nær fer løgtingið at bjóða Anfinni at verða náðaður, nær fer løgtingið og landsstýrið at góðtaka, at Anfinn er ósekur, ikki áðrenn 1990, men aftaná, tí viðurskiftini vórðu fingin í rættlag soleiðis, at Anfinn er at rokna sum ósekur. Hvussu mong ár skal Anfinn liva í ónáði, ellivu?

Eins og Dreyfus ikki fekk loyvi at luttaka í tí, sum fyri hann sum kapteyn í herinum var eitt hitt stórsta heiðursmálið, slapp Anfinn ikki aftur í landsstýrið.

Nú eru søgurnar ikki eins, og tað er tíðirnar heldur ikki. Heimurin er vorðin væl meiri demokratiskur síðani Dreyfussá dagar, halda vit. Men demokratiið hevur tað rættiliga ringt í Føroyum í hesar dagar. Hetta skulu vit hoyra meiri um í 4. og seinasta parti.

(framhald: Karaktermorð í nýggjari tíð 4: Ekskursión í undirgrundini)